einfaldari
- ger tað einfaldari
desember 2010

# Fyrsta brúðarvígslan í Lívdini



Mynd: Miriam & Janus

Hóast nógv pør, sum ganga í Lívdini, eru gift av Jógvani Zachariassen, var fyrsta brúðarvígslan í samkomuni hildin í Skúlanum við Løgmannabreyt leygardagin 6. november.

Tað vóru Eline K. á Roykheyggi og Rasmus Hammer, sum giftust hendan dagin. Nógv fólk vóru komin til vígsluna, og aftaná var høvi at heilsa upp á brúðarparið og familjuna.

Vígslan var kl. 12, og brúdleypið varð hildið fyri innbodnum í hølunum hjá Starvsmannafelagnum.

## Friður á jørðini

Tá Jesus júst var føddur, søgdu einglar frá hesi stórhending fyri nøkrum hirðum á markini uttan fyri Betlehem. Einglarnir sungu: *"Dýrd veri Gudi á hæddini, **friður á jørðini,** í menniskjum góður tokki!"*

Eini 2000 ár eru farin, og hendan tíðin hevur verið merkt av kríggi, ófriði, neyð og elendigheit. Ikki nógvur friður at hóma, og vit kunnu tí – við røttum kanska – spyrja, hvar hesin friður bleiv av.

Stutt áðrenn Jesus fór út at líða, talaði Hann við lærisveinar Sínar. Vit lesa í Jóh. 14, 27, at Hann sigur við teir: *"Frið lati Eg tykkum eftir, frið Mín gevi Eg tykkum; ikki sum heimurin gevur, gevi Eg tykkum. Hjarta tykkara óttist ikki og missi ikki mótið!"*

Eg hoyrdi einaferð eina søgu um tveir listamálarar, sum høvdu fingið til uppgávu at mála hvør sín málning um evnið frið. Annar málaði eitt landslag, har fullkomin friður valdaði. Klárur, bláur himmal, sólin skein og ikki eitt lot. Har var av sonnum friðarligt.



Hin málaði ein stóran foss, har nógv vatn dunandi datt niður í dýpið. Ein grein á einum træi hekk inn yvir fossin. Á greinini var eitt reiður, og í reiðrinum lógu nakrir ungar og svóvu. Hesir ungar kendu fullkomnan frið, hóast umstøðurnar rundanum vóru alt annað enn friðsælar.

Gud ynskir í Jesusi at geva hvørjum einstøkum menniskja hendan innara frið, sum ikki er treytaður av ytri umstøðum (les Fil. 4, 6-7).

*Absalon Áargarð*

# Hendingar & tiltøk

## Oman Hoydalar 28



Lívdin hevur keypt sethúsini oman Hoydalar 28 í Hoyvík. Húsini standa beint yvir av stykkinum, har sum Lívdin ætlar at reisa samkomubygningin. Húsini eru bygd í 1977 og eru 2 x 140 fermetrar til støddar.

Ætlanin er, at húsini skulu brúkast til miðvikutiltøk sum t.d. bønarmøti, ungdómsmøti, Lívsdropar og tónleikavenjing. Eisini ber til at hava skeið og onnur tiltøk fyri upp til umleið 50 luttakarar. Harumframt verður pláss til skrivstovur, samtalurúm og fundarhølir.

Samkomufundur var 17. november úti á Fløtum, har kunnað varð um tilgongdina fram ímóti keypinum, og 29. november varð skeytið undirskrivað av seljara og leiðslu/verjum í Lívdini. Eftir ætlan yvirtaka vit húsini umleið 1. januar.

Vit í leiðsluni eru sera takksom fyri, at Lívdin nú hevur ognað sær sítt fyrsta "heim". Bønin er, at Harrin skal ríkliga signa tað virksemi, sum fer at vera í og út frá húsunum.

*Jóhan*

## Til lukku við barninum

11. oktober fingu Jenny og Richard Áarskarð, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3.800 gr.

11. november fingu Sólva og Sam Vang í Hoyvík ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3.885 gr.

30. november fingu Ijeoma Regina Akpu og Høgni Háberg Hansen í Tórshavn eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3.900 gr.

## Bøn er ein gleði

Bøn er ein gleði og eini rættindi hjá okkum. Harranum leingist eftir at hoyra frá okkum – eisini um okkara stúranir. Einhvør trupulleiki, sum vit halda er ov lítil at koma fram fyri Harran við, er eisini ov lítil til at fáa loyvi at plága okkum.

*Corrie ten Boom*

**Corrie ten Boom**

Corrie ten Boom er kend frá bókini og filminum ”Skjulestedet”, ið er um familjuna ten Boom, sum undir seinna veraldarbardaga goymdi jødar í heimi sínum í Hollandi. Hetta førdi til, at familjan varð handtikin og sett í fangalegu, har bæði pápin og systirin vórðu dripin av nazistunum.

Eftir kríggið ferðaðist Corrie ten Boom kring heimin við boðskapinum um Guds kærleika og fyrigeving. Seinni fekk hon høvi at fyrigeva vaktarmonnum frá fangaleguni, har hon hevði sitið.



*Corrie ten Boom (1892–1983)*



## Kassameistari søkist!



Fíggjarbólkinum í Lívdini søkir eftir kassameistara.

Vit sóknast eftir fólki í samkomu okkara at hava ábyrgd av gjaldingum hjá Lívdini, sum er ein sera týdningarmikil uppgáva undir bókhaldinum hjá fíggjarbólkinum í Lívdini.

Arbeiðsuppgávurnar eru at taka sær av at gjalda rokningar hjá samkomuni og annars at hava samstarv við bókhaldaran hjá samkomuni. Viðkomandi kemur at vera ein partur av fíggjarbólkinum, har 7 limir eru. Fíggjarbólkurin vísir til samkomuleiðsluna í Lívdini.

Vit vænta, at tú ert álítandi, røkin og hevur áhuga í at vera við í hesi tænastu. Um tú ynskir at hjálpa til við hesum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Birgir Nielsen á tel. 502030 ella á teldupostadressu birgir@vodafone.fo. Kassameistarin verður settur skjótast gjørligt.

## Absalon aftur í leiðsluna



Sunnudagin 21. november varð Absalon Áargarð innsettur sum nýggjur limur í leiðsluni í Lívdini.

Saman við Jógvani Zachariassen, Jákupi Jacobsen og Jens Wang var Absalon ein av teimum fýra elstunum í Lívdini, tá samkoman byrjaði í 2001. Fyri trimum árum síðan fór Absalon úr leiðsluni.

Nú er hann so innsettur av nýggjum, og vit ynskja honum og familjuni Harrans ríku signing.

# Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

## Sunnudagin 5. desember

| | |
|---|---|
| Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: | *Familjuløta: Alive og UngLív* |
| Lovsongur og tala kl. 12.00: | *Alive skipar fyri møtinum* |
| | *Jógvan Zachariassen hevur eina stutta talu* |



Jógvan

## Sunnudagin 12. desember

| | |
|---|---|
| Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: | *Familjuløta: Hvussu Lívdin byrjaði* |
| | *Talari: Absalon Áargarð* |
| Lovsongur og tala kl. 12.00: | *Evni: Advent* |
| | *Talari: Poul Guttesen* |



Absalon

## Sunnudagin 19. desember

| | |
|---|---|
| Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: | *Evni: Jólasangmøti* |
| | ** Bert eitt møti* |



Poul

## Sunnudagin 26. desember

| | |
|---|---|
| Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: | *Møti við vitnisburðum og framførslum* |
| | ** Bert eitt møti* |



## Ungdómstiltøk:

| | |
|---|---|
| Alive: leygarkvøld kl. 21.00 | *(nærri verður lýst á heimasíðuni)* |

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · faldarin@livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*